einfaldari
- ger tað einfaldari
November 2012

# Talið av skógvaeskjum setti met




Sunnudagin 30. oktober var seinasta freist at lata skógvaeskjur inn til Christmas Child tiltakið í Føroyum. Tilsamans 4924 skógvaeskjur vórðu sendar av landinum í mun til 4790 eskjur í fjør. Hvørt ár verða 7-8 milliónir skógvaeskjur latnar børnum í 95 londum. Sjálvboðin fólk og felagsskapir í USA og fleiri evropeiskum og skandinaviskum londum savna eskjurnar. Í ár verða eskjurnar úr Føroyum latnar til børn í Rumenia.

lívdin
– í lívd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Hvørji vit eru

Tá ið onkur spyr „Hvørji samkomu gongur tú í?“, so skulu vit ikki skammast við at siga, hvønn trúarbólk vit hoyra til. Ikki skammast við røtur okkara! Men tað týdningarmiklasta er ærliga at kunna siga: „Eg gangi í eini samkomu, sum er bíbilsk í læru, opin í stíli, náðirík móti menniskjum og viðkomandi í samfelagnum.“ Hetta er ein góður endamálssetningur fyri allar samkomur!

Eyðkennir hetta samkomu okkara, so fer Gud at æra samkomu Sína, hóast vit hava brek og avmarkingar. Hann fer eisini at geva okkum ein nógv breiðari sjónarring viðvíkjandi alheimssamkomu Síni, soleiðis at vit ikki binda okkum í nøvn, stílar, tøl ella siðir.

Vit stevna eftir, at samkoma okkara fer at leggja størri dent á innihald enn útsjónd, størri dent á dýpd enn støddd, størri dent á dýrd Kristusar enn sjálvsøkni, størri dent á ævigar mannasálir enn sement, stál og timbur og størri dent á at fara út til onnur enn at fáa onnur inn til okkara. Gævi, at størri gleði og minni noyðsla, størri opinleiki og minni eygnatænasta, betri samfelag við onnur og færri long og óviðkomandi møti, færri fundir og fleiri tænastur eyðkendu okkum.



*Jógvan Zachariassen*

# Hendingar & tiltøk

## Jógvan og Poul í IKTUS




Hendan mánaðin sendir IKTUS báðar talurnar, sum Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen høvdu um samkomuna.

IKTUS sendir mikudag til leygardag kl.11:00, 16:00, 21:00 og 02:00.

Sunnudag frá kl.14:30 og 21:00 verður endursent frá vikuni.

Sí skránna og les meira á www.iktus.fo ella Facebook/Iktus

## TeenStreet gávukort

TeenStreet

TeenStreet 2013 verður í Offenburg í døgunum 27. juli – 3. august. Møguligt er at keypa TeenStreet gávukort á heimasíðuni: www.teenstreet.fo

Tað er kostnaðarmikið at fara á TeenStreet. Tí er tað eitt gott hugskot at geva teimum ungu, sum ætla sær til Offenburg í summar, eitt gávukort.

## Til lukku við barninum

Mánadagin 15. oktober fingu Senøva og Dánjal Petersen eina dóttur. Hon vigaði 3810 gr. og var 53 cm long. Hon eitur Eydna Maria Petersen. Á myndni er hon saman við stóra-beiggjanum David.



## Til lukku við hjúnabandinum



Fríggjadagin 19. oktober giftust í Santiago, Chile, Jóna Gunnarsson, Tórshavn, og Israel Carrasco, Santiago.

## Condoleezza Rice á GLS

Á altjóða leiðarastevnuni The Global Leadership Summit í Norðurlandahúsinum dagarnar 11. og 12. januar 2013 er fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin Condoleezza Rice ein av luttakarunum.



Hon er professari í politiskum vísindum á Stanford Graduate School of Business.

Condoleezza Rice fortelur m.a. um tær meginreglur, sum hava myndað nakrar av teimum størstu hendingunum í heiminum.

## Bíbliutímar úti á Fløtum



Annaðhvørt týskvøld verða bíbliutímar úti á Fløtum fyri ung fólk frá 8. flokki og eldri. Fyrsti bíbliutímin var týskvøldið 23. oktober, og tann seinasti verður 20. mars 2013. Byrjað verður kl. 18.00 við náttúrða og endað umleið kl. 20.00. Øll, ið ganga í 8. flokki og eldri, eru vælkomin. Meira upplýsingar á Facebook.com/utiaflotum.

## Heilsan úr Nigeria




*Brot úr heilsan frá Shino og Halli Mortensen, sum virka fyri Harran í Nigeria saman við døtrunum Kano og Nana:*

Síðani vit komu higar til Nigeria, hevur eitt av okkara hjartamálum verið at dagføra bókasavnið á skúlanum. Vit byrjaðu tí eitt átak fyri at royna at fáa stuðul uttanífrá til okkara bókasavn. Vit eru sera takksom fyri tað aftursvar, vit hava fingið - ikki minst úr Lívdini. Vit fingu pening sendan til endamálið, bæði frá okkara samkomu og einstaklingum í Føroyum og Japan. Bæði lærarar og næmingar eru sera glað og takksom fyri tykkara gávumildni.

Kano gongur í sunnudagsskúla í samkomuni, har vit ganga, og Shino er nú partur av toyminum, sum rekur sunnudagsskúlan. Okkara skúli, PACT, er nú komin í gongd aftur. Nógv tíð fer við at fyrireika og undirvísa níggju tímar um vikuna.

Biðið fyri sunnudagsskúlanum, har Shino tekur lut, undirvísingini á PACT, næmingunum, ið raktir eru av náttúruvanlukku, og at vit framvegis skulu hava góða heilsu.

*Heilsan Shino og Hallur*

## Bønarløtur í Lonini

Týskvøld kl. 20.00 eru bønarløtur í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

**Skráin fyri týskvøldini november 2012**

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 6. november | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 13. november | Bønarløta |
| Týskvøldið 20. november | Bønarløta |
| Týskvøldið 27. november | Kyknubólkar |

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

## Sunnudagin 4. november

Familjumøti kl. 10.30: Judith og Dánjal Lindarstein
Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Er nøkur trúgv í heiminum í dag?
Talari: Jógvan Zachariassen



Judith og Dánjal

## Sunnudagin 11. november

Familjumøti kl. 10.30: Rúna Lamhauge
Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Trúgv og verk
Talari: Jógvan Zachariassen

Rúna



## Sunnudagin 18. november

Familjumøti kl. 10.30: Dreingjakórið undir Brúnni
Hoyvíksmøti kl. 12.00: Talari: Jastrid Høj



Jógvan

## Sunnudagin 25. november

Familjumøti kl. 10.30: Vitnisburður
Hoyvíksmøti kl. 12.00: Talari: Lív Clementsen

Jastrid



### Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00



Lív

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*